## Del Piero hjálpir Juventus

Í triðu royndini eydnaðist tað Alberto Zaccheroni at vinna við Juventus, har hann tók við sum venjari í januar mánaði. Á heimavølli móti Genoa eydnaðist tað hjá Juventus at vinna 3-2. Alessandro Del Piero, sum undan dystinum bert hevði tvey mál á kontini hetta kappingarárið, skoraði til bæði 2-1 og 3-2. Seinna málið kom eftir brotsspark, sum Genoa-spælararnir vóru alt annað enn fegnir um.



## Gleðir seg til Milan

Týskvøldið rullar bólturin aftur í Champions League, og lagt er upp til eitt satt brak, tá Manchester United vitjar á San Siro hjá AC Milan. Ein dystur, sum Alex Ferguson gleðir seg til. – Eg haldi, at tað hóskar okkum væl at hitta teir júst nú. Teir spæld um vikuskiftið, meðan vit høvdu frí, og hartil hevur Milan eisini mist Kaka. Tað hevur gjørt tað neyðugt hjá teimum at broyta spælið, sigur vnjarin hjá Manchester United.



David Edvardsen er í ferð við at skjóta eitt av sínum 11 málum í steypafinaluni
Mynd: Álvur Haraldsen

# Edvardsen buldrar víðari

**David Edvardsen var aftur oddamaður hjá Neistanum um vikuskiftið. Í hesum kappinarárinum hevur hann av álvara fingið uppreisn**


uni@sosialurin.fo
Uni Holm Johannesen

- Málið skoraði DAVID EDVARDSEN!

Heilar 11 ferðir kundi David Edvardsen lata seg fagna sum málskjútta í finaluni leygardagin, meðan tað í hátalaranum varð kunngjørt, hvør skeyt málið. Lávaksni danin við stóra sjálvsálitinum gekk aftur undan hjá Neistanum hesaferð. Hann var aftur stóraspælandi hetta vikuskiftið og staðfesti sína støðu sum stjørnan av mongum stjørnunum hjá steypavinnarunum.

### Uppreisn

Eftir kappingarárið í fjør, tá hann ikki gjørdi stórvegis um seg, hevur David Edvardsen aftur prógvað sítt virði seinastu mánaðirnar. Við máltevi sum fáur í føroyskum hondbólti, eigur hann stóran leiklut í framúrskarandi gongdini hjá Neistanum í hesum kappingarárinum.

### Trý ár í Føroyum

David Edvardsen er í løtuni undir sítt triðja kappinarár í føroysku landskappingini. Eina viku undan kappingarbyrjan í 2007/2008 ringdi Claus Rasmussen, táverandi venjari hjá StÍF, til hansara og spurdi um hjálp. Mánaðin framman undan varð Danni Syhler knýttur at hópinum hjá strandingum, og hann hevði ávirkan á avgerðina hjá Edvardsen, sum tók av tilboðnum.

- Teir manglaðu ein lám, og eg tók av alt fyri eitt. Eg metti, at tað varð ein stór uppliving, segði David Edvardsen við Sosialin í 2008.

Við David Edvardsen og Danni Sylher sum undangongumenn, vann StÍF seg í finaluna í steypakappingini og landskappingini, men teir stóðu eftir við tveimum silvurheiðursmerkjum tá avtornaði.

Árið eftir skifti hann til føroyameistararnar úr Neistanum. Hann stóð av álvara í skugganum á Áka Mørk, Trónda Kragesteen, Jugoslav Djumic, Finni Hansson og øðrum. Edvardsen fekk ongantíð fótin fyri seg hjá teimum bláu, sum vann steypakappingina.

Men við einari rúgvu av málum og uppleggur hevur David Edvardsen verið ímyndin av álopsspælinum hjá Neistanum. Tað prógvaði hann aftur leygardagin.

### Lættur at undirmeta

Stórskjúttin David Edvardsen er lættur at undirmeta. Hann er lágvaksin, men tá hann sleppur til skot er eingin slingur í valsinum. Serliga í hesum kappingarárinum, tí hann sjáldan misnýtir sínar møguleikar. Jacob Larsen, fyrrverandi málverji hjá Neistanum, ivast heldur ikki í, at Edvardsen hevur frálík hondbóltsevni.

- Hann hevði staðið seg í næstbestu deildini í Danmark. Hann er uttan iva besti høgri bakkur í føroysku kappingini í løtuni, segði Jacob Larsen í 2008.

## FAKTA

**Navn:** David Edvardsen
**Føddur:** 15. desember, 1986
**Felag:** Neistin
**Pláss:** Høgri bakkur og vongur
**Ættaður:** Fredrikshavn, Danmark
**Búsitandi:** Tórshavn